einfaldari
- ger tað einfaldari
november 2010

# Christmas Child 2010



Sunnudagin 31. oktober var seinasta freist at lata skógvaeskjur inn til Christmas Child tiltakið í Føroyum.

Eskjurnar vórðu pakkaðar hjá Faroe Ship, og tilsamans 4.850 skógvaeskjur vórðu sendar av landinum í mun til 4060 eskjur í fjør. Í ár verða eskjurnar latnar til børn í Rumenia.

Nógvir áhugabólkar kring landið hava verið við til at savna inn skógvaeskjur til tiltakið, bæði samkomur, kirkjur, skúlar og onnur. Tá eskjurnar koma fram, verða tær í samstarvi við kirkjur, samkomur, skúlar og vælgerandi felagsskapir á staðnum latnar børnum á sjúkrahúsum, barnaheimum, flóttafólkalegum, býlum fyri heimleys og í fátækrabýlingum.

Umframt skógvaeskjurnarnar er fíggjarligi stuðulin úr Føroyum eisini munadyggur. Christmas Child fær umleið 100.000 krónur, sum verða nýttar til tilfar, lýsingar, flutning, leigan av vøruhúsum og til høvuðskontórið í Onglandi. Møguligt avlop fer til at stuðla annað arbeiði hjá felagsskapinum.

Fyrireikararnir takka øllum, sum hava stuðlað tiltakinum.

lívdin
– í lívd hins hægsta
Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

## Sannir tænarar eru miskunnsamir

Jóhannes ápostul spyr spurningin: "Tann, ið hevur góðs heimsins – og sær bróður sín líða neyð og letur hjarta sítt aftur fyri honum – hvussu kann kærleiki Guds verða verandi í honum!" Sannir tænarar eru miskunnsamir. Teir hugsa um onnur. Teir eru hjálpsamir. Teir gera "fingrarnar skitnar." Teir bjóða meiri enn bert tóm orð. Og hvat fáa teir afturfyri? Hvat sigur Kristus? "Teir skulu fáa náði á rættari tíð" (Heb. 4:16). Tey, sum ikki vilja geva, fáa ikki. Tey, sum ikki vilja koma nær at øðrum, verða einsom. Men tey, sum vilja geva, fáa. Tey, sum vilja koma nær at øðrum, skulu verða signað – bæði av Gudi og øðrum menniskjum við. Kom nær at onkrum hendan mánaðin at skilja og leska náði.



*Jógvan Zachariassen*

# Hendingar & tiltøk

### Kvøld fyri hjún

Leygarkvøldið 13. november verður skipað fyri einum kvøldi fyri hjún í Lívdini. Kvøldið verður skipað sum eitt hugnakvøld, har pørini sjálvi hava mat við, og eitt par kemur at hava eitt innlegg um hjúnabandið. Endamálið við hesum kvøldinum er at æra hjúnabandið og biðja Guds signing yvir øll hjúnabond. Øll hjún eru vælkomin til tiltakið, sum byrjar kl. 19. Tilmelding fer fram á heimasíðuni hjá Lívdini.

### Hjúnalega á Zarepta

Lega fyri hjún í Lívdini verður vikuskiftið 19.-21. november. Byrjað verður fríggjadagin eftir náttúrða, og legan verður liðug seinnapartin sunnudag. Kostnaður fyri leguna er 800 kr. fyri parið, og tekning fer fram við at senda teldupost til pko@olivant.fo.



### Kassameistari søkist!



Fíggjarbólkinum í Lívdini søkir eftir kassameistara.

Vit sóknast eftir fólki í samkomu okkara at hava ábyrgd av gjaldingum hjá Lívdini, sum er ein sera týdningarmikil uppgáva undir bókhaldinum hjá fíggjarbólkinum í Lívdini.

Arbeiðsuppgávurnar eru at taka sær av at gjalda rokningar hjá samkomuni og annars at hava samstarv við bókhaldaran hjá samkomuni. Viðkomandi kemur at vera ein partur av fíggjarbólkinum, har 7 limir eru. Fíggjarbólkurin vísir til samkomuleiðsluna í Lívdini.

Vit kunnu ikki bjóða nakra samsýning, men góðir møguleikar skuldu verið fyri at fingið ein góðan og gevandi felagsskap í fíggjarbólkinum, umframt at tú sjálvsagt fært ókeypis køkur og kaffi.

Vit vænta, at tú ert álítandi, røkin og hevur áhuga í at vera við í hesu tænastu. Um tú ynskir at hjálpa til við hesum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Birgir Nielsen á tel. 502030 ella á teldupostadressu birgir@vodafone.fo. Kassameistarin verður settur skjótast gjørligt.

### Jeg kan bære dine byrder



Bekymringerne lagde jeg frem for Ham,
jeg ville dem til Ham give.
Jeg bad for det som vanskeligt var -
lykkelig ville jeg gerne leve.

Men da jeg så gik videre,
efter at have bekendt min skyld,
Da følte jeg en dybere smerte.
Byrden var ikki forsvundet.

Hvorfor tager du ikke
bekymringerne bort?
Herre, vil du ikke høre
på mine spørgsmål og mine bønner?

Da hørte jeg ham sige:
Jeg vil gerne hjælpe dig mit barn
Byrden kan du give mig.
Bekymringerne tager jeg på mig,
hele vejen gennem livet.

Men husk på dette og glem det ej:
Det nytter ikke at plage seg selv.
Først når du giver dem fra dig,
kan jeg bære dine byrder.

*Betty Curti*

### CHRISTMAS CHILD 2003-2010

| Ár | Skógvaeskjur |
|---|---|
| 2003 | 335 |
| 2004 | 1.760 |
| 2005 | 2.900 |
| 2006 | 2.800 |
| 2007 | 3.000 |
| 2008 | 3.300 |
| 2009 | 4.060 |
| 2010 | 4.850 |
| Íalt | 23.005 |




### Køksbønin stuðlar nýggja bygninginum

Køksbønin fæst til keyps í Lívdini í trimum ymiskum støddum. Tað er Astrid Mouritsen, sum ger hesar plakatir. Peningurin fer óskerdur til nýggja bygningin hjá Lívdini.


Køksbøn

Á Harri signa køk mín her
so vakurt tá hann reinur er
og tá eg skal á borðið bera
hjálp mær tá mítt besta gera

Má føðin tann eg skal tilgera
av Tíni hond mær givin verða
at Tú mást leggja signing til
tá øllum væl hann gagnast vil

So signa lítla køk mín Gud
og tey um borðið taka lut.
Við Anda Tínum altíð nær
og signa gestirnar hjá mær

# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

## Sunnudagin 7. november

Familjuløta frá 10.30 – 11.30 — *Pauli Olsen hugleiðir*
** (í sambandi við samfelagsstevnuna í Havn verður bert eitt møti)*



Pauli

## Sunnudagin 14. november

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Familjuløta: Tilbiðjan og hugleiðing*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: 2010 familjan: Bestu vinir*
*Talari: Durita Djurholm*



Durita

## Sunnudagin 21. november

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Lívdin – framhald*
*Talarar: Leiðslan*

Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: 2010 familjan:*
*Tá hjúnabandið slitnar*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

## Sunnudagin 28. november

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Familjuløta: Hugleiðing um tilbiðjan*
*v. Unn Zachariassen*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Alt Gudi til dýrd*
*(Rómbrævið 15:1-13)*
*Talari: Jógvan Zachariassen*



Jógvan

## Ungdómstiltøk:

Alive: leygarkvøld kl. 21.00



Unn

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*